TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvøravegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 15/2016 |
| Fundardagur | 17. november 2016 kl. 15:00-16:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Bjarni Hammer, Anita Vibergsdóttir, Marjun Olsen, Jens Johannesen og Marit Poulsdóttir. Hallur í Heiðunum gav avboð til fundin.

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar

| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Fíggjarætlan 2017 Suðuroyar Barnavernd | 2 |
| 2 | Uppskot til fíggjarætlan 2017 til 2. viðgerð | 3 |
| 3 | Stroyming av býráðsfundum | 4 |
| 4 | Felags jólaborðhald fyri starvsfólk 2016 | 5 |



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 15/2016 |
| Fundardagur | 17. november 2016 kl. 15:00-16:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**27.18.00-A21-2-16**

## 1. Fíggjarætlan 2017 Suðuroyar Barnavernd

### Málsfrágreiðing

Fíggjarætlanin fyri Suðuroyar Barnavernd til umrøðu og góðkenningar.

**Fíggjarnevndin, 3. november 2016, pkt. 2:**

Fíggjarnevndin samtykti, at beina málið til viðgerð í Býráðnum áðrenn fíggjarætlanin hjá Suðuroyar Barnavernd 2017 verður góðkend. Fíggjarnevndin metir, at núverandi normering í barnaverndini á 4,7 er í hægra lagi. Tí heldur fíggjarnevndin, at tað er viðkomandi, at Býráðið umrøður fíggjarætlanina nærri, og at leiðarin í barnaverndini, Annika Jónsveinsdóttir, greiðir frá virkseminum.

**Býráðið, 4. november 2016, pkt. 4:**

Býráðið tók undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini um, at Annika Jónsveinsdóttir, leiðari í barnaverndini, kemur á fund við Býráðið og greiðir frá virkseminum í barnaverndini áðrenn Býráðið tekur endaliga støðu til fíggjarætlanina hjá barnaverndini.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá leiðaranum á Suðuroyar Barnaverndartænastu til eftirtektar.

Býráðið samtykti einmælt, at fíggjarætlanin hjá Suðuroyar Barnvernd fyri 2017 verður góðkend.

### Skjøl

- Bræv til Suðuroyar Barnavernd við avgerð frá Tvøroyrar Býráð viðvíkjandi fíggjarætlan 2017.
- Bræv til Suðuroyar Barnavernd við avgerð frá Tvøroyrar Býráð viðvíkjandi fíggjarætlan 2017
- Barnavernd 2017.xlsx
- Uppskot fíggjarætlan 2017



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 15/2016 |
| Fundardagur | 17. november 2016 kl. 15:00-16:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.30.00-S55-1-16**

## 2. Uppskot til fíggjarætlan 2017 til 2. viðgerð

### Málsfrágreiðing

Uppskot til fíggjarætlan 2017 fyri Tvøroyrar kommunu lagt fram fyri Býráðið til umrøðu og samtyktar.

**Fíggjarnevndin, 12. september 2016, pkt. 2:**

Fíggjarnevndin mælir til, at hava sama skattaprosent á 22,45 og sama barnafrádrátt á kr. 5.000,- í sambandi við fíggjarætlanina 2017.

**Býráðið, 14. september 2016, pkt. 2:**

Býráðið samtykti einmælt, at hava sama skattaprosent og barnafrádrátt fyri 2017 sum í 2016.

Býráðið mælti til, at Suðuroyar Bú- og Heimatænasta heldur seg til tað afturbering, sum er framroknað til 2017, og ikki fer upp um hesa upphædd.

Býráðið samtykti við 1. viðgerð einmælt fíggjarætlanina fyri 2017.

**Fíggjarnevndin, 16. november 2016, pkt. 1:**

Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at fíggjarætlanin fyri Tvøroyrar kommunu 2017 verður samtykt við einum skattaprosenti á 21.90 og barnafrádrátti á kr. 5.000,-

Fíggjarætlanin fyri 2017 javnvigar við 84,266 mió. kr.

Fíggjarnevndin beinir uppskoti til fíggjarætlan fyri 2017 til víðari viðgerð í Býráðnum.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum hjá fíggjarnevndini um at samtykkja fíggjarætlanina hjá Tvøroyrar kommunu fyri 2017.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 15/2016 |
|---|---|
| Fundardagur | 17. november 2016 kl. 15:00-16:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Býráðið samtykti fíggjarætlanina við einum skattaprosenti á 21.90 og barnafrádrátt á kr. 5.000,-

Persónskatturin er mettur til 55, 1 mió. kr. Partafelagsskatturin á 1,5 mió. kr. íalt 56,6 mió. kr.

Inntøkurnar er mettur til 73,3 mió. kr. íroknað afturbering til eldraøkið ímeðan rakstrarútreiðslurnar eru 64,4 mió. kr. Avlop frá rakstrinum á 8,9 mió. kr.

Íløgurnar eru á 16,4 mió. kr.

Fíggjarætlanin fyri 2017 javnvigar við 84,266 mió. kr.

### Skjøl

- FÆ 2017.docx
- Tilfar í sambandi við evnisfund viðvíkjandi ger av fíggjarætlan 2017

**00.01.00-A00-17-16**

## 3. Stroyming av býráðsfundum

### Málsfrágreiðing

Við atliti til opinleika og gjøgnumskygni í kommunalu fyrisitingini er tað skilagott, at stroyma býráðsfundirnar soleiðis, at borgarin fær beinleiðis innlit í tey mál, ið Tvøroyrar Býráð viðgerð og samtykkir. Uppskot um at stroyma býráðsfundir verður tískil lagt fram fyri Tvøroyrar Býráð til støðutakan.

**Fíggjarnevndin, 16. november 2016, pkt. 2:**

Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at keypa viðkomandi útgerð soleiðis at býráðsfundir framyvir verða stroymaðir beinleiðis.

Fíggjarnevndin beindi málið víðari til Býráðið til endaliga støðutakan.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 15/2016 |
| Fundardagur | 17. november 2016 kl. 15:00-16:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

Býráðið helt at uppskoti við at stroyma býráðsfundir var áhugavert, men ynskti fyrst at fáa fleiri upplýsingar um, hvussu útgerðin, ið er í uppskoti at keypa, virkar. Tí verður málið tikið upp aftur til viðgerðar á næsta býráðsfundi.

### Skjøl

- 360 graders kamera Tvøroyri kommune - byrådsmøder.pdf
- Stroyming av býráðsfundum

**81.04.00-A00-1-16**

## 4. Felags jólaborðhald fyri starvsfólk 2016

### Málsfrágreiðing

Umsitingin hevur gjørt av, at skipa fyri felags jólaborðhaldið fyri øll starvsfólk hjá Tvøroyrar kommunu tann 10. desember í ár. Hetta hevur verið roynt áður við góðum úrslitið. Felags jólaborðhaldið kemur ístaðin fyri at geva jólagávur og at hvørt rakstrarstað skipar fyri jólaborðhaldið, sum kommunan í nøkrum førum skal gjalda fyri.

Endamálið við einum tílíkum jólaborðhaldið er eisini at samansjóða ymisku fakbólkarnar í kommununi umframt er talan um eitt herðaklapp til tey mongu starvsfólkini hjá kommununi, sum útinna eitt gott arbeiði fyri kommununa í dagligdegnum. Kostnaðurin fyri felags jólaborðhaldið er mettur til at vera áleið kr. 55.000,- sum Býráðið verður biðið um at umrøða og samtykkja.

**Fíggjarnevndin, 16. november 2016,pkt. 3:**

Fíggjarnevndin mælti einmælt til, at kommunan játtar nevndu upphædd á áleið kr. 55.000,- til fyriskipan av felags jólaborðhaldið til starvsfólk í Tvøroyrar kommunu.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini um, at játtað fígging til jólaborðhaldið 2016 hjá starvsfólkum í Tvøroyrar kommunu.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 15/2016 |
| Fundardagur | 17. november 2016 kl. 15:00-16:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Skjøl

- Kostnaðarmeting felags jólaborðhald 2016
- Innbjóðing til jólaborðhaldið
- Jólafrokost
- Spurningurin um kommunan skal geva jólagávur ella fyriskipa felags jólaborðhald.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 15/2016 |
| Fundardagur | 17. november 2016 kl. 15:00-16:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin kl. 16:00**

Kristin Michelsen

Bjarni Hammer

Anita Vibergsdóttir

Marjun Olsen

Jens Johannesen

Marit Poulsdóttir

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 15/2016 |
| Fundardagur | 17. november 2016 kl. 15:00-16:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan